Torleif Sigurðsson

fyrrverandi formaður FSF's farin

Týsdagin, 12. februar komu sorgarboðini um, at Torleif Sigurðsson var farin bert 61 ára gamal.

Í 1980 varð Torleif valdur í nevndina í Fótbóltssambandinum, og virkaði hann fyrstu tíðina sum kassameistari. Í 1981 tók Torleif við sum formaður og røkti hetta starv, til hann valdi at leggja frá sær á aðalfundinum í 2002. Torleif kom sostatt at standa á odda fyri føroyskum fótbólti í tvey ártíggir, merkt av innanhýsis broytingum og altjóða samstarvi; rembingar, sum førdu føroyskan fótbólt inn á altjóða pallin og fram til tað, hann er í dag.

Torleif var ein vitbjartur, lítillátin og ósjálvsøkin hugsjónarmaður, ið hevði hegni sum fáur at loysa stórar og truplar uppgávur. Hann var viljasterkur, støðufastur og væl lýddur bæði her heima og í altjóða arbeiðnum, føroyskum fótbólti at frama. Í 2004 varð Torleif útnevndur sum heiðurslimur í Fótbóltssambandi Føroya og heiðraður av UEFA við útnevningini "Order of Merit in Ruby".

Nú hann so brádliga varð tikin burtur, var hann framvegis virkin innan føroyskan fótbólt sum formaður í KÍ og hevði eitt tætt og framrættað samstarv við Fótbóltssambandið.

Nú tú ert farin, Torleif, hevur føroyskur fótbóltur mist ein av sínum fremstu undangongumonnum, og vit mongu, sum gjøgnum hesi nógvu árini hava havt eitt tætt tilknýti til tín, hava mist ein góðan og trúfastan vin. Ein trúgvur tænari hevur lagt árarnar inn, og vit drýpa høvur og fella tár í samkenslu við tykkum, sum eftir sita.

Ærað verður minnið um Torleif Sigurðsson.

Fótbóltssamband Føroya

Óli Holm, forseti

†

Andlát og jarðarferðir

Margit Kyster í Tórshavn andaðist í heiminum leygardagin 65 ára gomul. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum týskvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin kl. 13.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at góða mamma, vermóðir, omma og langomma okkara

Sofie Sevdal
Fía á Regni
ættað úr Leirvík

andaðist á Vesturstovu í Fuglafirði týsmorgun
12. februar, 96 ára gomul.
Kistan fer úr Vesturstovu kl.17.00 oman í Siloa.
Jarðarferðin verður úr Siloa í Fuglafirði
leygardagin, kl.13.00.

Familjurnar vegna
Regin, Jógvan Páll, Hegin og Osla

Fimm ættarlið

Tann 10. februar 2008 samlaðust 5 ættarlið til barnadóp:
Aftast frá vinstru: *langomman Lorensa Zachariasen á Eiði, 60 ár, mamman Karin Zachariasen í Keypmannahavn, 23 ár, omman Tordis Zachariasen í Tórshavn, 42 ár, og fremst olduromman Anna Vang Ejdesgaard á Eiði, 91 ár, við lítla Róin Olaf Zachariasen f. 9. desember 2007, Keypmannahavn*

Diamantbrúdleyp

14. februar 2008 kunnu

Mathilda og Fríðrik Poulsen
Klaksvík

halda 60 ára brúdleypsdag

Dagurin verður hildin á Klaksvíkar Sjómansheimi frá kl. 18-23. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Tíðin rennur sum streymur í á ...

Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við

Dagurin
14. februar. Valentinus. Fleiri halgimenni bera hetta navnið. Í angulsaksiskum londum, serliga í Amerika, senda gentur og dreingir hvør øðrum gávur ella skrivligar ástarkvøður, valentines, á hesum degi. Navnið er latín og merkir raskur ella kraftarmikil. Jens Kristian Svabo doyði hendan dagin í 1824, 78 ára gamal.